ítróttur

Nr. 231 • hósdagur • 1. desember 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Jónleif var 51 ferðir á vøllinum

**Tann dómarin í landinum, sum hevði mest at gera í fjør, var Jónleif Frederiksen. Í Formula-deildini dømdu Lassin Isaksen og Páll Augustinussen vóru við 20 dystum hvør mest regluligu dómararnir í Formula-deildini**

**FÓTBÓLTSDÓMARAR**
*Jákup Mørk*

Hetta framgongur millum annað av framløguni, sum Dómaranevndin hjá FSF hevði um vikuskiftið, tá tikið var saman um dómarapartin av landskappingini 2005.

At kappingarárið varð longt, gjørdist ikki bara strævið hjá fótbóltsspælarunum. Dómararnir hava í ár havt fleiri dystir enn nakran tíð áður at hugsa um, og hjá teimum mest aktivu varð talan um hálvthundrað dystir. Einans átta dómarar hava verið um teir 135 dystirnar, sum hava verið spældir í Formula-deildini. Og hartil skulu roknast allir dystirnir, sum eru spældir í aðru, triðju og fjórðu deild.

Jónleif Frederiksen, sum er linjudómari í Formula-deildini, og sum annars dømir í lægru deildunum, var ikki færri enn 51 ferðir á vøllinum til skrásettar dystir í fjør.

Rúni Gaardbo var 49 ferðir á vøllinum, og annars lá dystartalið hjá flestu dómarunum um teir 40 dystirnar.



*Saman við Páll Augustinussen dømdi Lassin Isaksen ikki færri enn 20 av teimum 27 umførunum í Formula-deildini*

Eitt tal, sum er væl hægri, enn tað nakran tíð hevur verið áður.

### Eygleiddu 110 ferðir

Eisini hjá eygleiðarunum gjørdist talan um eitt heldur strýggið kappingarár. Talið av eygleiðarum í ár hevur verið seks, og tils samans hava teir seks eygleitt 110 dystir. Av hesum vóru teir 96 í Formula-deildini.

Og komandi ár verður talan um enn fleiri dystir. Tí er einki forgjørt í, at bæði FSF og Dómarafelagið hava stóran áhuga í at økja um talið av aktivum dómarum. Hvørt tað arbeiðið longu ber ávøkst komandi kappingarár er so ein annars spurningur. Tað stendur tó mest sum víst, at talið av dystum í næst bestu deildini hækkar við eini helvt, og so er bara at vóna, at dómararnir kunnu setast á allar dystirnar.




*Talvan sýnir, hvussu nógvar dystir einstøku dómararnir í vaksnamannadeildunum dømdu í 2005. Eitt ár, sum hevur tað strævnasta nakran tíð hjá føroyskum fótbóltsdómarum*

## Teir tríggir bestu í heiminum eru funnir

Fyrr í vikuni varð kunngjørt, at Ronaldinho var valdur at vera besti fótbóltsleikari í Evropa. Tá listin yvir teir tríggjar bestu leikararnar í heiminum, varð almannakunngjørdur í gjár, stóð navnið hjá Ronaldinho eisini á hesum listanum.

Tað eru ítróttarfjølmiðlafólk, ið hava valt Ronaldinho til besta leikara í Evropa, meðan tað í kappingini um at gerast heimsins besti leikari eru landliðsvenjarar og liðskiparar úr øllum FIFA limalondunum, ið hava atkvøtt.

Vinnarin verður almannakunngjørdur 19. desember, men í gjár vóru tey trý ovastu nøvnini almannakunngjørd. Teir tríggir á listanum eru Ronaldhinho og Samuel Eto'o úr FC Barcelona og Frank Lampard úr Chelsea FC. Frank Lampard gjørdis nummar tvey í kappingini um at gerast besti fótbóltsleikari í Evropa. Í fjør vann Ronaldinho virðislønina.

**-nud**